

*Spenningurin var í hæddini, tá Martin Poulsen um páskirnar gjørdist nýggjur føroyameistari í talvi. Umdystir móti tveimum øðrum telvarum máttu til, áðrenn heitið varð veruleiki*

# Tá Martin bleiv føroyameistari

**Tað varð eitt øgiligt drama beint undan at tað bleiv greitt, at umdystur mátti til fyri at avgera landsliðsbólkin og harvið FM-heitið. Somuleiðis varð neyðugt við umdysti í unglingabólkinum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Undan seinasta umfari býttu tríggir telvarar fyrsta plássið. Martin Poulsen, Ólavur Simonsen og føroyameistaran frá í fjør, Hans Kristian Simonsen. Flóvin Tór Næs var beint í hølunum við hálvum stigi færri. Avgerandi hólmgongurnar í seinasta umfari, vórðu hesar: Ólavur hevði hvíta fólkið móti Martini, Hans Kristian hevði hvítt móti yvirritaða, meðan Flóvin skuldi royna seg móti IM Sævar Bjarnason.

Framanundan varð mett av teimum flestu, telvarum og áskoðarum, at Hans Kristian hevði bestan møguleika fyri at minst ognað sær sæti í umdysti. Hann hevur góðar royndir av at leika móti Carl Eli - eitt nú vann hann móti sama mótstøðumanni í seinasta og avgerandi umfarinum í fjør FM - og hevði hann eisini hvíta fólkið. Fáur væntaði at Flóvin fór at røkka einum umdysti, tí so skuldi hini úrslitini fløska seg ómetaliga væl, samstundis sum hann skuldi vinna á Sævar, sum hevði havt eina góða kapping. Martin hevur seinastu árini havt gott tak á Ólavi, men orsakað av at hann skuldi stýra svarta herinum, javnvigaði nøkunlunda kjansirnar í tí talvinum.

## Ótrúlig vend

Tá talvini øll vóru komin inn í triða tíman, høvdu bæði Ólavur og Hans Kristian góðar støður, umframt materilistiskan yvirvág. Flóvin stóð væl verri, men hevði møguliga okkurt mótálop í skjáttuni.

Við eitt, og at kalla í somu stund, hendi óvæntaðar og avgerandi hendingar í øllum trimum talvunum. Til stórt spell fyri Ólavur, gav hann í endatalvinum, við tveimum meirfinnum, eina finnu ókeypis til Martin. Martin takkaði fyri gávuna, og fekk tryggjað sær javnleikin.

Flóvin hevði ørkymlað íslendaran somikið við kontraálopi sínum, at íslendarin mátti geva skarvin yvir. Carl Eli útnyttaði eini tveir feilir hjá Hans Kristiani, sum stutt framanundan hevði vinnandi leik, og vann lættliga endatalvið við riddara í yvirskoti.

Flóvin býtti sostatt plássið við Hans Kristian, og skuldi nú út í umdyst við Martin og Ólavi.

## Martin vísti format

Kviktalvsumdysturin (25 min hvør + 10 sek pr. leik) bleiv leiktur stutt eftir seinasta umfar. Ein skipan, sum ikki áður hevur verið brúkt. Tað er gott fyri fyriskiparnir og áskoðarar, at føroyameistari verður funnin sama dag sum FM endar, men telvararnir sjálvir høvdu kanska vilja sæð, at ein vanligur nærtalvsumdystur varð telvaður, eitt nú í summar, eins og tað bleiv gjørt í 2000, tá Flóvin vann FM-heitið. Men hesar fyritreytir vistu allir luttakararnir undan kappingarbyrjan.

Ólavur vildi havt vunnið FM, vegna betri mótstøðustig í sjálvar FM-kappingini, um hann endaði á deildum fyrsta plássi í umdystinum. Fyrsta talvið varð millum ein sera uppsettan Martin og Flóvin, sum bert tyktist fegin um at hava fingið hendan møguleika, sum hann á morgni sama dag als ikki hevði væntað.

Talvið er við í blaðnum í dag, og sum tað sæst, leikti Martin væl, og vann uppiborið hetta talv og FM, tá hann í seinna talvinum eisini vann á Ólavi. Ein lítil søga fylgir við í tí talvinum. Ólavur helt nevnliga at hann mátti vinna á Martini, fyri at kunna hava nakran møguleika at ognað sær fyrsta plássið. Men so var veruleikin ikki. Javnleikur móti Martini, og síðani ein sigur á Flóvin, hevði givið honum FM-heitið! Tað nærmast syrgiliga er, at Ólavur hevði í talvinum ein kláran javnleik, sum hann væl sá, men ikki helt var nøktandi...

## Norður og Suður

Eyðkent heitið til stóru 80´ara sjónvarpsrøðina um amerikanska borgarakríggið. Og í unglingabólkinum varð tað nevnliga ein norðoyingur og ein suðringur, sum høvdu høvuðssleiklutirnar. Rani Baldursson úr Klaksvík og Sjúrður Thorsteinsson av Tvøroyri fingu báðir 6,5 stig av 8, og umdystur mátti tí til fyri at finna føroyameistaran.

Dysturin bleiv leiktur samstundis sum tann í landsliðsbólkinum, og tí varð eisini stórur hyggjaraskari til unglingatelvingina. 16 ára gamli Rani Baldursson er eftirhondini ein telvari við nógvum royndum, eitt nú NM fyri unglingar, og var hann eisini tætt við at vinna FM í fjør. Í ár gekk betur hjá honum, og vann hann eftir góða telving 1,5 — 0,5 á tí sera drúgva tvøramanninum, sum vit uttan iva fara at síggja meir til. Talentið er eyðsæð hjá Sjúrða, og so situr hann eisini niðri við talvborðið at kalla alt talvið! Ein eginleiki sum unglingar yvirhøvur als ikki hava. Vaksnir telvarar eru ei heldur heilt ósekir í hasum førinum...

## Talvið hesa vikuna

**Martin Poulsen (2259) - Flóvin Tór Næs (2317)**
FM-umdystur, 19.04.2003

**1.d4 Rif6 2.Rif3 e6 3.Bg5 d5 4.e3 h6 5.Bh4 c5 6.c3** (Varðlig telving av Martin, men hinvegin eisini sunn) **6...Ric6 7.Ribd2 Be7 8.Bd3 0—0 9.dxc5 Bxc5 10.0—0 Be7 11.Fe2 e5 12.Bxf6 Bxf6 13.e4 dxe4** (Helst hevði d4 verið sunnari. Støðan opnast nú upp, og Martin fær lítlan fyrimun) **14.Rixe4 Be7 15.Rig3!** (Hvítur útnyttar rúmdina á borðinum, við at seta á e-finnuna, samstundis sum riddarin peikar á f5,h5 puntarnar og bispurin vendir sær ímóti konginum) **15...Fc7 16.Rfe1 Re8 17.Fe4** (Gevur svørtum fleiri veikleikar kring kongin **17...g6 18.Bc4 Kg7 19.Rixe5** (Djarvt, men hinvegin ikki besti leikur, tá svartur kann svara leikinum aftur við 19...Bg5! og støðan verður óklár) **19...Bd6?** (men nú hevur Martin møguleikan, og hendan tekur hann) **20.Bxf7!**



**Støðan eftir 20. Bxf7**

**Rixe5 21.Bxe8 Bf5 22.Rixf5+ gxf5 23.Fa4 Fe7 24.Bh5 f4 25.Rad1 Rf8 26.Rxe5?** (Óneyðugt, men Martin ætlaði sær at fáa bispin við næsta leikinum, men so varð ikki. Tó hevur hvítur enn greiðan fyrimun við meirfinnum. Báðir vóru í hesu løtu í tíðarneyð) **26...Fxe5 27.Fd7+ Be7 28.Fxb7** (Nú kundi svartur lagt kongin, men hann treiskast sjálvsagt í hesum týðandi umdysti. Ein kann jú ikki vinna nakað talv við at gevast) **28...Rd8 29.Ff3 Rxd1+ 30.Fxd1 Bc5 31.Bf3 Fe6 32.a3 a5 33.Fe2 Ff5 34.h3** (Nú verður so ikki mát í botninum...) **34...a4 35.Fe4 Ff6 36.Fxa4 Bb6 37.Fd7+ Kf8 38.a4 Fe5 39.Fc8+ Kg7 40.Fb7+ Bc7 41.Fe4** og tíðin hjá Flóvini gekk undan í hesari kortini vónleysari støðu **1—0**



GÍ-FSV 6-5 eftir brotsspørk, 0-0:

# Brotsspørk áðrenn málið varð funnið

**Talan var um heldur linligan dyst í Sarpisgerði, men spenningurin um víðari luttøkuna helæt alla tíðina nervanum**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Hóast fótbóltslíkindini ikki vóru av teimum bestu kring landið, so var tað ikki hetta, sum bilti í Sarpisgerði sunnudagin. Eitt lot var eftir vøllinum, og tað var nakað ráligt, men tað átti tó at verið gjørligt, at fingið ein so toluliga góðan fótbóltsdyst burturúr kortini.

## Lingligt

Men hetta kom tó als ikki upp á tal. Snøgt sagt, so var talan um ein dyst av teimum heldur linligu, har spælið fram eftir vøllinum ongan tíð gjørdist serliga skipað, og har tað tí var sera langt ímillum teir hendinga málmøguleikar,s um sum stungu seg upp.

Frá byrjan var tað sjónligt, at fyri báðar var tað úrslitið, heldur enn tað vakra spæli, sum tað ráddi um hendan dagin. Dentur varð lagdur á verjuspælið, har báðir partar vóru sera væl skipaðir. Ikki minst vágamenn, sum í Ara Thomassen og Jóhannis Joensen hava tveir leikarar, sum avgjørt teljast millum teir frægu, tá spælið skal leggjast niðaneftir kantunum, men sum hinvegin eisini teljast millum stinnastu miðverjarnar í landinum.

Var talan um nakað veruligt yvirtak, so mundi tað vera heimaliðið, sum hevði hetta. Ofta fingu teir sett hampuligt av á miðvøllinum, soleiðis at spælið varð spjatt oman eftir síðunum, men so gekk tað heldur ikki meira. Sera sjáldan komu álopini somikið langt, at talan gjørdist um nakra vandamikla støðu framman fyri málinum, og tað er helst nóg so sigandi, at størsti møguleiki fyri steðgin kom eftir óneyðugt bólttap á Vágaverjuni.

## Eingi mál

Seinna umfarið var ikki stórt øðrvísi. Vindurin var kanska vaksin eitt vet, men hóast gestirnir høvdu hendan undan, so tóktust teir ikki vilja satsa tað, sum var neyðugt. Heldur varð vóna, at Clayton Soares og Bjarni Prior kundu skapa okkurt einsamallir, men hóast tað onkuntíð var upptrekk til slíkt, so kom ikki nakað ítøkiligt burturúr. Næstur at skora var helst Bjarni, tá hann av miðjuni hevði sæð málverjan hjá GÍ nakað langt úti, men skotið fór framvið málinum.



*Tað vóru sjáldan ábendingar um nakað mál í Sarpisgerði sunnudagin, og tí gjørdist tað at enda neyðugt við brotsspørkum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hinvegin megnaði GÍ at skapa eina veruliga yvirvág, og seinastu løtuna kundu teir við eitt sindur av hepni havt fingið okkurt málið. Ikki minst tá Krzystof Poipczynski ta einu ferðina var komin mest sum ígjøgnum, áðrenn hann legði útfrá til Símun Samuelsen, men skot hansara varð blokkað av verjuleikara.

Tí varð neyðugt við umdysti, og nú gjørdist alt meira sannlíkt, at brotsspørk skuldu til. Óttin fyri at tapa var snøgt sagt størri enn viljin at vinna, og eftir 120 málleysar minuttir skuldu venjararnir so velja teir fimm, skuldu skjóta brotsspørkini.

Og ikki kann sigast annað enn, at væl varð valt. Teir fyrstu fim hjá hvørjum parti sendu allir skotini í málið, og so var tað ein og ein. Her misnýttu vágamenn í fyrstu royndini, tá málverjin, Jákup Joensen, sendi beint á Jacek Przyuilski, sum ikki lat seg snýta til aðra síðuna, og hevði GÍ dystarbóltin. Hesin varð latin í hendurnar á blaðunga Hanus Jacobsen, og hann var ísakaldur, tá hann sendi trygt í netið.

Sostatt eru gøtumenn víðari, og einki er at taka seg aftur í, at úrslitið var tað týdningarmesta, sum hendi í Sarpisgerði hendan dagin. Spælið í áðrar mátar var einki at reypa av, men enn er so nakað av tíð at betra um hetta, áðrenn tað av álvara fer at telja hjá liðunum í landskappingini.

### Dysturin í tølum

**GÍ-FSV 6-5 eftir brotsspørk, 0-0**
Dómari: Eiler Rasmussen: Átti at vera nógv harðari í revsingini av mongu taklingunum aftanífrá.

# Kvinnurnar eru klárar

**Ikki óvæntað eru tað leikarar úr KÍ, sum eru bulurin á kvinnulandsliðnum, sum um knappar tveir mánaðir skal verja føroysku litirnar á Oyggjaleikunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seinastu Oyggjaleikirnir vóru teir fyrstu, har kvinnufótbóltur var á skránni, og ikki kann sigast annað enn, at føroysku umboðini stóðu seg væl. Fyri tað allarmesta, so var talan um alt ov veika mótstøðu hjá okkara, og vegurin fram til finaluna varð mest sum lagdur oman á stórsigrar.

Sjálv finalan varð tó ein gysari av teimum stóru, men við tíggju kvinnum á vøllinum eydnaðist loksins hjá okkara at skora avgerandi málið í 5-4 sigrinum á Álandi.



*Tað eru fyrst og fremst meistararnir og steypavinnararnir úr Klaksvík, sum eiga bulin á landsliðnum*

Tað verður hetta, sum ætlanin er at endurtaka á Guernsey nú í summar, og fríggjadagin boðaði landsliðsvenjarin frá, hvørjar 18 hann ætlar sær at hava við í hópinum.

## Eingin Helga

Ikki óvæntað, so eru tað greipuvinnararnir úr KÍ, sum eiga bulin á liðnum. Ikki færri enn sjey av teimu km18 eru úr hesum feløgum, og tá so tær tríggjar útisetarnir eru lagdar afturat, gevur hetta átta leikarar til hini feløgini í landinum. A vheum hevur HB tær fýra, meðan GÍ, B68 og B36 so mugu býtast um hinar.

Tað, sum kanska er mest merkisvert við úttøkuni, er annars, at eingin Helga Ellingsgaard er í hópinum. Ivaleyst fremsti føroyski kvinnuligi leikarin seinnu árini hevur ikki longur stundir til fótbóltin, og tó at landsliðsvenjarin vónaði til tað seinasta, at hon fór at gera nakað við venjingina, so varð hetta tó av ongum.

Hinvegin er einki at ivast í, at tað aftur í ár er ein hópur, sum kann koma heilt langt. Flestu av leikarunum hava nú royndirnar frá seinastu Oyggjaleikum, og afturat teimum eru so fleiri ungar og evnaríkar gentur komnar, sum ivaleyst vilja gera sítt til at fáa spælitíð á vøllinum.

Komandi tveir mánaðirnir fara kvinnurnar at venja eftir skrá, sum er fastløgt av landsliðsvenjarunu, Álvi Hansen. 10 av hesum venjingum eru á skránni, og seinast í juni mánaði verður kósin so sett móti Guernsey.

Leikararnir á kvinnulandsliðnum eru hesar:
Anna Kristian Joensen, GÍ
Heidi Heinesen, GÍ
Randi S. Wardum, HB
Eyðfríð Kristiansen, HB
Kristina D. Simonsen, HB
Halltóra Joensen, HB
Vivian Bjartalíð, KÍ
Annelisa Justesen, KÍ
Una Olsen, KÍ
Bára Skaale, KÍ
Ragna B. Andreasen, KÍ
Malena Josephsen, KÍ
Rannvá B. Andreasen, KÍ
Ása Dam á Neystabø, B36
Maibritt Olsen, B68
Sólva Joensen, FV København
Ann Silja á Borg Madsen, FV København
Eyðvør úr Dímun, Bårse IF